Aksel V. Johannesen **Nr. 9/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini §52a
Fyrispurningur um byrgingina um Haraldssund, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera ábøtur á byrgingina um Haraldssund?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at brúka grót frá tunlunum Norður um Fjall til byrgingina um Haraldssund?

Viðmerkingar:

Byrgingin um Haraldssund hevur verið eitt afturvendandi evni á politisku dagsskránni seinastu mongu árini, men framvegis mugu vit staðfesta, at henda farleið als ikki er tíðarhóskandi. Nakrar ábøtur eru gjørdar gjøgnum árini, men framvegis er langt á mál. Landsverk mælir í Samferðsluætlanini til, at arbeiðið við at tryggja farleiðina fer í gongd beinanvegin.
Sum spyrjarin hevur skilt á Landsverki er ikki í stóran mun neyðugt at brúka tunnilsgrót til verkætlanina, sum ætlanin er at gera, tí ætlanin er at endurnýta alt tilfarið frá verandi byrging til nýggju byrgingina, og sambært Landsverki er einans tørvur á heilt stórum dekkgróti afturat tilfarinum, sum longu er í byrgingini. Tað kann tó vera ein fyrimunur at hækka byrgingina eitt sindur meira enn Landsverk upprunaliga hevði ætlað, og til tað arbeiðið kann tunnilsgrót brúkast.
Byrgingin um Haraldssund treingir til at verða dagførd, og nú arbeiðið við tunlunum Norður um Fjall fer í gongd í nærmastu framtíð, hevði verið upplagt at tryggjað sær ein part av grótinum til hetta arbeiðið.
Sum er kenna fólk seg ikki trygg at koyra eftir hesi farleið í ringum veðri vegna mikið sjórok, og hvørki gongu- ella súkklubreyt er á leiðini. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 24. august 2020

Aksel V. Johannesen